## ENDAMÁL

1. At næmingurin fær førleikar í hoyrilæru á einum støðisvarandi til upptøkukrøvini til konservatorium
2. at menna musikalska oyrað (gehørið), tónastigkenslu, førleikar at improvisera, auditiv greiningarамboð og musikalskt hugflog, umframt at læra musikkteori (tónlæru)
3. at menna innlæringshættir hjá næminginum

**Innihald:**

Kenna aftur og syngja m.a. tónabil, akkordir og tónastig
Har umframt akkordgongdir (progressiónir), lurtiuppgávur, rytmur, akkordir, primavista og m.a venjing í fyrisøgn av melodi, rytmu og akkord og harmoniskum gongdum

**Viðmerking:**

Fyrsta árið á Miðnámi ganga næmingar á rytmisku deild til hoyrilæru saman við næmingum á klassisku deild.

## 1. árið (samlestur við klassisku deild)

**Tónabil (intervall):**

Tónavav eina oktav

**Akkordir:**.

dur, moll, minkaðar (dim.), umvaksnar (aug.), dominant 7, sus

**Fyrisøgn:**

1. Melodisk fyrisøgn
2. skriva niður 5 spældar nótar út frá givnum nóta
3. rytmisk fyrisøgn, ymisk taktsløg:
   2/4 - 3/4 - 4/4 ella 2/8 - 3/8 - 4/8.
   6/8 - 9/8 - 12/8

**Blaðlestur:**

1. rytmu blaðlestur
2. syngja frá blaðnum

**Kenna aftur tónleik:**

Spæld verða brot úr kendum tónleikaverkum. Næmingurin roynir at tíðarfesta (barokk, klassik osfr), finna genru (strúkikvartett, konsert, symfoni o.s.fr.) og at gita hvør tónaskaldið er.

## 2. árið

**Tónabil:**

Tónavav tvær oktavir

**Akkordir:**

1. fýrklangir (laðaðir tertsir): dur7, moll7, maj7, o7, sus7, moll-maj7, moll7b5 (ø)
2. Tríklangir: dur, moll, minkaðir (dim.), umvaksnir (aug.) í øllum viðvendingum

**Tónastigar:**

Allar kirkjutónalu stigarnar, melodiskan og harmoniskan moll

**Prima vista sangur:** diatoniskt

**Fyrisøgn:**

1. melodisk: endurtaka (syngja) og skriva niður eitt lagbrot
2. rytmisk: endurtaka og skriva niður rytmiskt brot

**Akkordgongdir:**

## 2. ársroynd

**Lurta og skriva niður:**

1. tónabil, tónavav tvær oktavir
2. fýrklangir (laðaðir tertsir)
3. tríklangir í dur og moll í øllum viðvendingum
4. tónastigar
5. einfalt lag
6. rytmubrot

## 3. árið

**Tónabil:**

Tónavav óavmarkað

**Akkordir:**

Høgt bygdar akkordir í grundformi

**Tónastigar:**

Teir, sum vanliga verða brúktir í jazztónleiki, t.d. altereraður, lokriskur #2 (hæðka 2. stig), heiltónastigi, mixolydiskur #11 (hæðka 11. stig) (= lydiskur b7) og oktatonur stigi

**Prima vista sangur:**

Løg við leysum forteknum

**Fyrisøgn:**

1. Melodisk fyrisøgn: endurtaka (syngja) og skriva niður eitt lagbrot
2. rytmisk fyrisøgn: endurtaka og skriva niður rytmiskt brot

**Improvisera eftir oyranum** (gehør)

**Akkordgongdir (progressiónir):**

Á einum støði, svarandi til einfaldan jazz standard

## 3. ársroynd

**Lurta og skriva niður:**

1. tónabil, tónavav óavmarkað
2. høgt bygdar akkordir í grundformi
3. tónastigar
4. melodi
5. rytmu brot
6. akkordgongdir